LØGMANSSKRIVSTOVAN

THE PRIME MINISTER'S OFFICE



# Ársfrágreiðing 2013

*Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp*

# Innihaldsyvirlit

Formæli .... 2
Føroyar í menningarsamstarvshøpi .... 3
Lógargrundarlag .... 3
Raðfestingar .... 3
Fyrisiting .... 4
Eftirlit .... 4
Menningarsamstarv Føroya 2013 .... 5
Samstarvslond .... 5
Um verkætlanirnar .... 6
Etiopia - menna góðskuna av skúlaundirvísingini .... 6
Palestina – øking av skattainntøkum .... 8
Nepal – undirvísingarverkætlan .... 9
Kenja – heilsuverkætlan .... 11
Togo – vatn- og heilsuverkætlan .... 12
Uganda – undirvísing .... 13
Neyðhjálp .... 14
Virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv .... 16
Verkstova fyri føroyskar hjálparfelagsskapir .... 17
Um samstarvspartarnar .... 19
Fíggjarnýtsla 2013 .... 20

# Formæli

Tað verður mangan sett spurnartekin við, um tað nyttar at lata menningarstuðul. Tað kann vera trupult at svara ítøkiliga, tí menningarsamstarv er langskygt, og úrslitini síggjast ofta ikki fyrr enn nógv ár aftaná, at stuðulin er latin.

Heimsbankin og stóru menningarstovnarnir kanna javnan fortreytirnar fyri væleydnaðum menningar-samstarvi. Úrslitini eru samansett. Ávirkanin av einari menningarverkætlan er oftast treytað av kringumstøðunum. Tað verða t.d. bygd vælvirkandi flakavirki í menningarlondum við tí fyri eyga at menna fiskivinnuna. Men um streymurin er svikaligur, og eingin ísur er at køla fiskin við, verður úrslitið ikki sum væntað. Slík viðurskifti kunnu hava við sær, at verkætlanir ikki skapa ætlaðan framburð og menning. Tað er tí ein grundleggjandi fortreyt at kenna væl til kringumstøðurnar, tá farið verður undir eina menningarverkætlan.

Tað hevur gingið framá seinastu 10-15 árini at røkka menningarmálunum hjá ST. Vøkstur er í Eysturasiu og í fleiri afrikanskum londum, og øktu íløgurnar í útbúgving og heilsu hava givið úrslit. Men hóast framburðurin er týðiligur, er enn langt á mál at basa fátækdømi og hungursneyð.

Føroyar lótu 2 milliónir krónur í menningarstuðli í 2013. Samstarvið fevndi um seks verkætlanir innan heilsu, útbúgvin og at menna haldgóða fyrisiting í ávikavist Kenja, Togo, Nepal, Uganda, Etiopia og Palestina.

Hóast okkara ískoyti ikki er stórt í altjóða høpi, leggja vit stóran dent á, at okkara partur munar fyri tey menniskju, sum fáa hjálp. Royndirnar, ið vit hava gjørt okkum higartil vísa, at tað er av stórum týdningi, at samstarvsparturin er við til at menna verkætlanina, og kennir ognarskap. Tá er sannlíkt, at virksemið heldur fram, hóast verkætlanin formliga er liðug. Føroyskt menningarsamstarv snýr seg sostatt í stuttum um at veita *hjálp til sjálvhjálp*.

Í Tinganesi, 8. mai 2014

Kaj Leo Holm Johannesen

løgmaður

## Føroyar í menningarsamstarvshøpi

Seinastu árini hevur játtanin til menningarsamstarv verið 2 milliónir krónur um árið. Harumframt er serstøk játtan til neyðhjálp, sum í 2013 var 500.000 krónur.

Føroyar lótu stuðul til seks verkætlanir í 2013. Samstarvið fevndi um verkætlanir innan heilsu, útbúgvin og at menna haldgóða fyrisiting í ávikavist Kenja, Togo, Nepal, Uganda, Etiopia og Palestina.

Menningarsamstarvið verður í høvuðsheitum framt í samstarvi við NGO[1] hjálparfelagsskapir, bæði føroyskar og útlendskar. Samstarvað verður eisini við stjórnarfelagsskapir, t.d. heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu tjóðum, World Food Programme (WFP) og Heimsbankan.

## Lógargrundarlag

Virkað verður eftir løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv. Sambært løgtingslógini er høvuðsendamálið við altjóða menningarsamstarvi at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum gjøgnum burðardygt menningarsamstarv. Umframt at virka fyri hesum máli, hevur landsstýrið sett sær fyri at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum.

## Raðfestingar

Menningarsamstarv verður umsitið í Uttanríkistænastuni á Løgmansskrivstovuni. Støðið verður tikið í framtíðar menningarmálunum hjá ST *Millenium Development Goals*, og útbúgving og heilsa verða raðfest fremst í menningarsamstarvi. Hetta er grundað á, at útgangsstøðið fyri menningarsamstarvinum er sjálvberandi menning, og tá er útbúgving grundarlagið. Góð heilsa er ein treyt fyri at kunna læra, tí hanga útbúgving og heilsa óloysiliga saman. Fiskivinnuverkætlanir verða somuleiðis raðfestar, tí her hava vit serstaka vitan og førleikar at lata. Dentur verður harumframt lagdur á at skapa møguleikar fyri

---

[1] NGO er stytting fyri non-governmental organization - ikkistjórnarligir felagsskapir.

[2] Útreiðslur í sambandi við eftirlitsferðir o.a. fer ikki av játtanini til menningarsamstarv. Hendan játtan verður bert nýtt til verkætlanir.

[3] OECD er stytting fyri Organisation for Economic Cooperation and Development.

[4] Dalit er ein lág samfelagsstætt (kasta) í Nepal. Fólk, ið hoyra til hesa samfelagsstætt eru fyri mismuni í samfelagnum og verða t.d.

virknari føroyskari luttøku. Hetta verður serliga gjørt við at knýta føroyskar felagsskapir og føroyska serfrøði at verkætlanum.

## Fyrisiting

Tað eru alt fleiri felagsskapir, bæði føroyskir og útlendskir, sum venda sær til Uttanríkistænastuna við umsóknum til verkætlanir. Í 2013 fekk Uttanríkistænastan 18 formligar umsóknir, umframt nakrar áheitanir um samstarv. Stórur partur av umsóknunum vórðu mettar at vera stuðulsverdar, men við støði í játtanini á Fíggjarlógini var bert gjørligt at lata seks verkætlanum stuðul.

Í kunngerð nr. 72 frá 25. juni 2008 um altjóða menningarsamstarv eru neyvar treytir og reglur fyri, hvør ið kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðul verður játtaður. Her eru at nevna krøv til fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og afturrindan av stuðli.

Umsøkjarar nýta umsóknarblað, sum tekur støði í formligu krøvunum til stuðul. Nýtt umsóknarblað og vegleiðing, bæði á enskum og føroyskum, varð tikið í brúk við ársbyrjan 2012. Í tilfarinum er neyv lýsing av, hvat krevst fyri at fáa stuðul til menningarverkætlanir, samstundis sum tað verður greitt frá, hvat umsóknin skal fevna um. Umsóknarblaðið skal sendast til Uttanríkistænastuna talgilt ella í pappírsútgávu. Gjølligari verkætlanarlýsing og møgulig onnur skjøl skulu sendast talgild. Tvær árligar umsóknarfreistir eru: 1. mai og 1. november. Lýst verður við stuðlinum á www.tinganes.fo.

Málsviðgerðin verður fyrireikað í Uttanríkistænastuni. Umsóknirnar verða síðani lagdar fyri ráðgevandi nevndina fyri altjóða menningarsamstarv til ummælis. Til ber at lesa meira um ráðgevandi nevndina á s.16.

## Eftirlit

Eftirlitið verður framt við frágreiðingum, roknskapi ella grannskoðaðum roknskapi samsvarandi ásetingunum í kunngerðini um altjóða menningarsamstarv. Allir stuðulsmóttakarar undirrita eitt avtaluskjal, eina sokallaða *Grant Agreement*, har neyvar ásetingar fyri upplýsingarskyldu eru ásettir. Í avtaluni millum Uttanríkistænastuna og móttakaran er somuleiðis ásett, at myndugleikin tilskilar sær rætt at gera eftirlit á staðnum, tá ið tað verður mett neyðugt ella hóskandi.

Við avmarkaðari fíggjarligari orku er neyðugt at raðfesta gjølla, hvagar og hvussu ofta farið verður á eftirlitsferð[2]. Eingin eftirlitsferð varð framd í 2013. Seinasta eftirlitsferð var í 2012, tá vitjað varð í Kambodia, har tvær verkætlanir fingu stuðul úr Føroyum.

## Menningarsamstarv Føroya 2013

Í 2013 var játtanin til menningarsamstarv 2 milliónir krónur. Allur stuðulin hetta árið varð latin umvegis NGO felagsskapir. Sum sæst á myndini niðanfyri, so var stórur partur av játtanini nýttur til undirvísingarverkætlanir, harnæst heilsuverkætlanir og ein lítil partur til at menna haldgóða fyrisiting. Nakrar av verkætlanunum eru framhald av verkætlanum, ið fingu stuðul í 2012.




## Samstarvslond

Stuðul verður bert latin londum, ið OECD[3] skilmarkar sum menningarlond. OECD ger regluligar bólkingar av, hvørji lond kunnu skilmarkast sum menningarlond, mett eftir BTÚ fyri hvønn íbúgva. Flestøll ídnaðarlond ganga eftir hesi bólking.

[2] Útreiðslur í sambandi við eftirlitsferðir o.a. fer ikki av játtanini til menningarsamstarv. Hendan játtan verður bert nýtt til verkætlanir.

[3] OECD er stytting fyri Organisation for Economic Cooperation and Development.

OECD lutar menningarlond í fýra bólkar: 1) Minst mentu londini (Least developed countries), 2) onnur láginntøku lond (Other low income countries), 3) lægri miðalinntøku lond og umveldi (Lower middle income countries and territories), og 4) hægri miðalinntøku lond og umveldi (Upper middle income countries and territories). Ásetingarnar fevna um allar fýra bólkar. Verkætlanir í bólki 1 og 2 verða raðfestar fremri enn í bólki 3 og 4, um tær annars uppfylla krøvini og verða mettar stuðulsverdar. Eitt yvirlit yvir bólkarnar er s. 21.

Sum sæst á myndini omanfyri, varð stuðulin latin til verkætlanir í Kenja, Togo, Nepal, Uganda, Etiopia og Palestina. Togo, Nepal, Uganda og Etiopia verða bólkað í bólki 1 (minst mentu londini). Kenja í bólki 2 (onnur láginntøku lond), meðan Palestina verður bólkað í bólki 3 (lægri miðalinntøku lond og umveldi).

## Um verkætlanirnar

### Etiopia - menna góðskuna av skúlaundirvísingini

Uttanríkistænastan játtaði 259.000,00 kr. til eina skúlaverkætlan í Yem-økinum í Etiopia í 2013. Felagsskapurin Action Aid stendur fyri verkætlanini, ið hevur til endamáls at bøta um fysisku karmarnar í Tiger Primary School og at menna tilvitskuna í økinum um týdningin av skúlagongd.

Millum átøkini at røkka endamálinum verður:

- Arbeitt við at økja um tilgongdina og at minka um fráfallið, við serligum atlit at gentum
- Arbeitt við at økja tilvitskuna í samfelagnum og skúlaleiðsluni um týdningin av skúlagongd, við serligum atlit at gentum
- Bygd eina lon við 12 nýggjum skúlastovum, sum kunnu hýsa 600 næmingum hvørt ár (harvið minkar talið av næmingum í hvørjari skúlastovu niður í 50 næmingar).
- Innbúgv og frálærutilfar (pultur, borð, stólar, talvur og benkur) útvegað til nýggju flokshølini.

Etiopia verður bólkað millum heimsins minst mentu lond. Nærum 30% av íbúgvunum á 91 milliónir liva undir  fátækramarkinum. Yem-økið, sum liggur 264 km í ein útsynning frá Addis Ababa, er heimstaður hjá Yem-fólkinum, ið livir einamest av jarðarbrúki og frá hondini til munnin. Kanningar vísa, at umleið 65% av vaksnu íbúgvunum eru analfabetar. Orsaka av vánaligum umstøðum í skúlunum er hetta eisini gongdin hjá yngru ættarliðunum. Umleið ein triðingur av børnum í økinum ganga ikki í skúla og duga ikki at lesa og skriva.

Tiger skúlin var bygdur í 1976. Eingin skúli var í økinum, so foreldur tóku stig til at byggja skúlan við avmarkaðum fíggjarligum stuðli frá stjórnini. Nærum ongar ábøtur eru framdar síðani, og skúlin er í so mikið ringum standi, at tað ávirkar heilsustøðuna hjá næmingunum. Í løtuni ganga 70 børn í hvørjum flokki. Fleiri av børnunum mugu sita á moldgólvinum. Tað er trupult at hoyra læraran, og tey fáa støv í eyguni. Fráfallið í skúlanum er 50% hægri enn aðrastaðnis í økinum. Fráfallið ímillum genturnar er serliga høgt. Tær hava nógvar uppgávur í heiminum, og hava ringar stundir at røkja skúlan. Tær verða mangan giftar á ungum aldri, og tá steðgar skúlagongdin. Gentur eru eisini í serligum vanda fyri harðskapi, harímillum umskering. Ofta er avleiðingin eisini her, at skúlagongdin steðgar.

Verkætlan var sett í verk 1. oktober 2013. Á myndini niðanfyri sæst ein skúlastova, sum er í gerð. Verkætlanin heldur fram til árslok 2014. Stuðulin úr Føroyum svarar til kostnaðin av 4 skúlastovum.



# Palestina – øking av skattainntøkum

72.000 kr. vóru latnar í 2013 til eina verkætlan í Ramallah. Palestinensiska stjórnin er farin undir at byggja upp eina sjálvstøðuga skattaumsiting við tí endamáli at økja um inntøkurnar hjá tí almenna fyri at kunna veita borgarunum grundleggjandi tænastur (m.a. innan undirvísing, heilsu, atgongd til reint vatn, savnan av rusk o.s.fr).

Tommy Petersen, ið starvast sum seniorráðgevi hjá DANIDA og Palestinensku stjórnini, stendur fyri verkætlanini, ið er ein partur av "Municipal Development Programme" hjá Danida.

Sambært lógini um menningarsamstarv kann landsstýrið samstarva við stjórnir í menningarlondum. Samstarvið kann fevna um fakliga ráðgeving og fíggjarligan stuðul til lutvísa fígging av verkætlanum, har ætlanin er at skipa haldgóða fyrisiting og at tryggja sosial framstig. Føroyar eru í hesum sambandi áhugaverdar, m.a. tí umsitingin her longu hevur verið fyri samanleggingum av ymsum stovnum sum fyrr hvør sær kravdu inn skatt og almenn gjøld, sum MVG og toll. Eisini verdur skattaskipanin í Føroyum í altjóða høpi mett at verda frammarlaga tøkniliga og einfald uppbygt, og kann tí verða nýtt sum fyrimynd aðrastaðnis.

Verkætlanin er skipað sum ein kanningarferð við uppfygjandi verksetan. Av tí at stuðulin varð latin við árslok 2013 var ikki gjørligt at fremja ferðina fyrr enn í 2014. Ein bólkur av embætismonnum úr Palestina, saman við einum japanskum serfrøðingi frá Japan International Co-operation Agency, og Tommy Petersen vóru í Føroyum í døgunum 2.-7. mars 2014. Fylgið vitjaði í Fíggjarmálaráðnum, hjá TAKS og Kommunufelagnum, har starvsfólk greiddu frá føroysku skipanini.
Eisini varð vitjað í trimum ymiskum kommunum (Tórshavn, Klaksvík og Hvannasund) fyri at kunna seg um teirra sjónarmið viðvíkjandi skattaskipanini, og hvussu teirra lutur er í skipanini. Hesar vitjanir vóru við til at varpa ljós á hvussu kommunali parturin av skattagjaldinum verður nýttur at lata borgarum í kommunum almennar tænastur.
Væntaða úrslitið av ferðini er samanlegging av fýra skatta- og avgjøldsdirektoratum við fylgjandi umlegging, og at egininntøkan hjá kommunum og stjórnini hækka og tað tískil verður gjørligt at veita borgarunum betri tænastuveitingum og harvið hægri lívsgóðsku.



Fylgið var á kurteisi vitjan hjá løgmanni. Í fylginum vóru: Tommy Petersen, seniorráðgevi hjá DANIDA, M. Nofal, aðalstjóri í palestinensisku skattastýrinum, I.Akel, aðalskrivari APLA (Kommunufelagið í Palestinu), H. Al Jaloudi,skrivstovustjóri, altjóða deildin í fíggjarmálaráðnum í Palestinu, G. Daraghmeh,skrivstovustjóri í Kommunumálaráðnum í Palestinu og J. Koki, serfrøðingur, JICA.

# Nepal – undirvísingarverkætlan

Føroyar lótu 702.000 kr. til eina undirvísingarverkætlan í Nepal, sum felagsskapurin VSO stendur fyri. Talan er um eina 4-ára verkætlan, har stuðul eisini varð latin úr Føroyum til 3. árið. ES Nevndin er høvuðsstuðul. Verkætlanin hevur til endamáls at veita 15.000 illa støddum børnum úr seks fátækøkjum í Nepal grundleggjandi og nøktandi skúlagongd. VSO samstarvar við Undirvísingarmálaráðið og økismyndugleikar um verkætlanina. Fráfallið í barnaskúlanum er stórt í Nepal og góðskan í undirvísingini er ivasom nógvastaðni. Útsettir bólkar sum Dalit børn[4], børn, ið bera brek og gentur hava lægri luttøku í skúlaskipanini og verri avrik. Tað eru fleiri orsøkir til tess, m.a. vánalig atkoma, mismunur og fátækdømi.

[4] Dalit er ein lág samfelagsstætt (kasta) í Nepal. Fólk, ið hoyra til hesa samfelagsstætt eru fyri mismuni í samfelagnum og verða t.d. noktað atgongd til matstøð, tempul og onnur almenn støð. Hóast tað sambært lóg er bannað at fremja mismun móti fólki, ið hoyra til Dalit stættina, verður ikki stórvegis gjørt fyri at steðga hesum í Nepal.



Arbeitt verður t.d. við at menna undirvísingarhættir, har børnini luttaka í undirvísingini í størri mun. Mynd: VSO.

Verkætlanin fevnir um eina røð av tiltøkum, ið skulu viðvirka til, at børnini koma í skúla, og at tey ikki eru fyri mismuni í skúlaskipanini: kanningar av hví børn ikki vera send í skúla, menning av skipanum, ið tryggja at øll børn verða innskrivað í skúla og gjøgnumføra skúlagongdina, stovnan av serflokkum til børn, ið eru fráfallin/afturúr, førleikamenning av lærarum og leiðslu o.s.fr.

64 skúlar eru partur av verkætlanini og higartil hevur hon rokkið 16.765 næmingum og førleikament 238 lærarar:

| Landslutir | Tal av skúlum | Tal av lærarum | Tal av næmingum |
|---|---|---|---|
| Baglung | 9 | 41 | 1450 |
| Kailali | 13 | 44 | 8020 |
| Kaski | 15 | 42 | 1300 |
| Myagdi | 9 | 43 | 1087 |
| Rupandehi | 12 | 37 | 3666 |
| Surkhet | 6 | 31 | 1242 |
| Tilsamans | 64 | 238 | 16.765 |

# Kenja – heilsuverkætlan

368.000 kr. vóru latnar til eina heilsuverkætlan í Kenja í 2013, sum felagsskapurin Christian Aid stendur fyri. Verkætlanin fer fram í Narok County, sum liggur í útsynningspartinum av Kenja. Endamálið við verkætlanini er at betra um heilsustøðuna hjá kvinnum, ið eru við barn, at minka um pinkubarnadeyða, at betra um tænastur og viðgerð í sambandi við barnsburð og barnarøkt og at kunna um barnaavmarking. Tiltøkini fevna um bygging av tveimum føðideildum, keyp av útgerð, førleikamenning av fakfólki, upplýsandi átøk, fyribyrging o.s.fr.



Mynd: Christian Aid.

Kenja telist millum heimsins fátækastu lond. Í Narok County, har verkætlanin fer fram, liva 33.7 prosent av íbúgvunum undir fátækramarkinum. Bert 41.4 prosent av íbúgvunum í økinum duga at lesa, og heilsustøðan er ikki góð. 65.4 prosent av børnunum eru tarna í vøksti og atkoman til reint vatn er sera vánalig í Narok County. Høga talið av kvinnum, ið lata lív í sambandi við føðing, boðar eisini frá, at tað ein átrokandi tørvur á at betra um heilsustøðuna hjá mammum og børnum í økinum.

Talan er um eina fýra ára verkætlan, ið byrjaði í januar 2013 og heldur fram til árslok 2016.

# Togo – vatn- og heilsuverkætlan

200.000 kr. vórðu latnar úr Føroyum í 2013 til eina vatn- og heilsuverkætlan í Togo. Seinna útgjald á 237.000 kr. verður latið í 2014 (treytað av játtan). Talan er um eina 5-ára verkætlan, har stuðulin úr Føroyum fellur innanfyri 3. og 4. árið. ES-Nevndin og menningarstovnurin í Jersey eru høvuðsstuðlar.

Verkætlanini hevur til endamáls at økja um atgongdina til reint drekkivatn og at bøta um reinføris-viðurskiftini í 40 bygdum í Blitta-landslutinum í Togo. 80 nýggj vatnhol skulu borast, 75 skúla-latrinublokkar skulu byggjast, og 1850 familjur skuu hava hjálp at gera latrinur. Mett verður at 53.441 fólk, harav 32.265 børn, fáa ágóðan av verkætlanini.



Tað eru børnini, ið verða harðast rakt, tá ið tað vantar vatn og tá vatnið ikki er reint. Mynd: Plan UK.

Togo er millum heimsins minst mentu lond. Blitta-økið er eitt av teimum fátækastu økjunum í landinum, og hetta sæst m.a. á pinkubarnadeyðanum, ið er sera høgur (86/1000). Bert 65 prosent av íbúgvunum í landinum hava atgongd til reint vatn. Talið verður mett at vera munandi lægri í Blitta-økinum, har bert 25 prosent av íbúgvunum hava atgongd til reint drekkivatn, og bert 6 prosent atgongd til latrinur ella líknandi. Ein triðingur av íbúgvunum hevur í minsta lagið ein hálvan tíma til gongu eftir vatni. Við hesari verkætlan gerst lættari at fáa reint drekkivatni. Hetta hevur stóra ávirkan á

heilsustøðuna hjá íbúgvunum í økinum, ið harvið eisini fáa betri møguleika og stundir at hugsavna seg um útbúgving og inntøkuskapandi tiltøk.

## Uganda – undirvísing

393.350 kr. vórðu latnar til verkætlanina “Tackling violence against children and creating safer schools in Eastern Uganda”, ið felagsskapurin Action Aid stendur fyri. Verkætlanin byrjaði í januar 2014 og heldur fram í trý ár. ES-Nevndin er høvuðsstuðul.

Uganda er millum heimsins fátækastu lond. Landið hevur verið krígsherjað í fleiri áratíggju, og hetta hevur við sær, at 51prosent av íbúgvunum í landinum eru undir 15 ár. Hóast fleiri børn ganga í skúla enn áður, er fráfallið sera høgt. Mett verður at tvey út av trimum børnum, ið byrja í barnaskúla, gevast áðrenn tey koma í framhaldsdeild. Størsti parturin eru gentur. Harðskapurin í landinum ávirkar eisini børnini, bæði heima og í skúlanum. Gentur eru í serligum vanda, m.a. fyri umskering. Børn, ið bera brek hava tað somuleiðis trupult og eru fyri mismuni í skúlaskipanini. Mett verður at uml. 1,2 milliónir børn bera brek í Uganda.

Verkætlanin fer fram í 40 barna- og framhaldsskúlum í eystara parti av Uganda, og hevur til endamáls at skapa eitt tryggari skúlaumhvørvi í økinum. Ítøkiligu átøkini eru:

- At tryggja at børn í 40 barna- og framhaldsskúlum kunnu koma trygg í skúla
- At fráboðanarskyldan hjá avvarðandi myndugleikum verður herd, og at harðskapur móti børnum verður fráboðaður
- At førleikamenna økisleiðarar, felagsskapir og onnur í teimum 40 økinum, við tí endamálið at seta orð á harðskap móti børnum, og at seta tiltøk í verk fyri at basa harðskapinum
- At stuðla økismyndugleikum í at samtykkja lóggávu, ið forðar fyri harðskapi móti børnum og kvinnuligari umskering.
- At tryggja at børn í teimum 40 skúlunum, ið bera brek, luttaka í skúlaundirvísingini

## Neyðhjálp

Endamálið við hesi játtan er at veita neyðhjálp, tá ið vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Hjálpin verður vanliga latin gjøgnum sjálvbodnar hjálparfelagsskapir, sum t.d. Reyða Kross og altjóða stjórnarfelagsskapir, t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme (WFP). Játtanin verður eisini nýtt í sambandi við áheitanir frá altjóða myndugleikum um at lata pening til at basa hungursneyð.

Neyðhjálp hevur undanfarin ár verið málsøki hjá Uttanríkistænastuni á Løgmansskrivstovuni, men í málsøkjabýtinum frá 2011 varð málsøkið flutt í Heilsumálaráðið at umsita. Samstundis varð játtanin til neyðhjálp hækkað úr 300.000 upp í 500.000 kr.

Fyrstu tíðina samstarvaðu Uttanríkistænastan og Heilsumálaráðið um umsitingina av játtanini til neyðhjálp. Frá 2013 varð umsitingin av málsøkinum endaliga flutt í Heilsumálaráðið.

Játtanin í 2013 var nýtt til neyðhjálp í Sýria og á Filipsoyggjunum.

### Stuðul til neyðhjálp í Sýria

Í frágreiðing frá ST, sum varð almannakunngjørd á vári í 2013, varð staðfest, at sýriska stjórnin við Bashar al-Assad forseta á odda hevur framt hópdráp á sivilfólkið, bumbað sjúkrahús og útint ræðulig krígsbrotsverk í royndini at vinna aftur landøki frá uppreistrardeildum. Samstundis hava uppreistrardeildir eisini framt brotsgerðir sum avrættingar, gíslatøkur og brúkt sivil sum skjøldur ímóti bumbunum frá einaræðisstýrinum.

Stríðið í Sýria hevur havt við sær, at milliónir av menniskjum eru flýdd úr sínum heimum. World Food Programme metir, at umleið helmingurin av teimum neyðstøddu eru børn. Felagsskapurin arbeiðir fyri at fáa átrokandi neyðsynjarvørur, serliga matvørur, til mongu heimleysu flóttafólkini.

Í september 2013 lat Heilsumálaráðið 300.000 krónur umvegis World Food Programme til neyðhjálpararbeiði í Sýria.

## Stuðul til neyðhjálpararbeiði á Filipsoyggjunum

Fyrst í november 2013 herjaði ódnin Haiyan Filipsoyggjarnar við ógvusligari megi. Talan varð um eina av harðastu ódnunum, ið hava rakt Filipsoyggjarnar. Fleiri enn 10.000 fólk lótu lív og fleiri 100.000 húsast á rýmingarmiðstøðum ella bráðfeingis hjá familjum og kenningum. Í minsta lagið 4,5 mió. fólk vóru rakt av ódnini.

Tann 12. november 2013 gjørdi Heilsumálaráðið av at lata 200.000 krónur í stuðli til neyðhjálpararbeiðið á Filipsoyggjunum. Stuðulin varð latin umvegis Reyða Kross Føroya til neyðsynjarhjálp.



Mynd: Lauren Twohig/American Red Cross.

## Virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv

Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv veitir ráðgeving í sambandi við útinnan av lógini um altjóða menningarsamstarv, og í sambandi við viðgerð av umsóknum. Nevndin arbeiðir eftir ásettari fyriskipan, og hevur formann og fýra limir, ið verða tilnevndir at sita í eitt fýra ára skeið.

Í nevndini sita:

- Jens Helgi Toftum, formaður. Jens Helgi er útbúgvin fiskivinnufrøðingur og starvast sum fulltrúi í Fiskimálaráðnum. Hann hevur drúgvar royndir innan altjóða samráðingar og nevndararbeiðið.
- Annika Hoydal, næstforkvinna. Annika starvast sum ljósmóður á LSH, og hevur royndir innan menningarsamstarv úr Kambodia, har hon hevur ráðgivið í heilsuverkætlan hjá Reyða Kross.
- Heri Kjærbo, starvast partvís sum missiónsskrivari í Heimamissiónini, og sum leiðari fyri "Innovation & Aid" hjá Tent As. Heri hevur tikið hægri útbúgving í missiologi, og hevur átta ára royndir innan trúboðan og hjálpararbeiði í Tansania.
- Nicolina Lamhauge, starvast sum policy greinari hjá OECD í París. Hon hevur eina MA í altjóða menningarsamstarvi, og hevur harumframt royndir úr felagsskapi í Bangladesj, ið veitir mikrolán.
- Bogi Eliasen, verkætlanarleiðari á FarGen. Bogi er útbúgvin samfelagsfrøðingur, og hevur staðið fyri arbeiðinum at tilevna føroyskan menningarsamstarvspolitikk á táverandi Uttanríkisdeildini

Nevndin hittist 3 – 4 ferðir um árið. Skipað verður fyri árligum evnisdøgum, har nevndin viðgerð viðkomandi evni. Harumframt eru tveir serstakir fundir, har umsóknir um menningarsamstarv verða lagdar fyri nevndina til ummælis.

## Verkstova fyri føroyskar hjálparfelagsskapir

10. oktober 2013 skipaði Uttanríkistænastan fyri verkstovu fyri føroyskum hjálparfelagsskapum. Verkstovan er ein liður í at skapa ein pall, har føroyskir felagsskapir kunnu samskifta um felags áhugamál og avbjóðingar.

Jens Helgi Toftum, formaður í ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv, bjóðaði vælkomin og greiddi frá krøvum og raðfestingum í sambandi við stuðul.

Síðani hevði Jacoba Kruse, ið tekur eina MA í African Studies, Human rights and poverty á Københavns Universitet, framløguna: Munar tað? og fyri hvønn? Jacoba gjøgnumgekk ymisk rák innan menningarsamstarv og greiddi m.a. frá sjónarmiðunum hjá Dambisa Moyo, ið hevur skrivað bókina Dead Aid. Jacoba hugleiddi eisini sjálv um bygdabankan, kvinnurnar og drepanandi stuðulin við íblástri frá Dambisa Moyo.

Margretha Nónklett, fulltrúi í menningarsamstarvi, rundaði tiltakið av. Kunnað varð um umsóknarfreistir og um hvat ein fullfíggja umsókn skal fevna um.



Eini 20 fólk luttóku á verkstovuni umboðandi ABC Barnahjálp, Neyðhjálparbussin, Reyðakross, Heimamissiónina, Blá Kross og ráðgevandi nevndina fyri menningarsmastarv. Á myndini til vinstru eru Jacoba Kruse og Jens Helgi Toftum.

Høvið var at seta spurningar og at skifta orð aftaná. Fleiri felagsskapir vístu á, at at málini og krøvini til at fáa stuðul eru sera høg – serliga tá hugsað verður um hvussu lítil játtanin er. Føroyskir felagsskapir eru smáir og hava ikki somu royndir sum stórir altjóða felagsskapir. Tí kann tað vera trupult hjá føroyskum felagsskapum at liva upp til strongu krøvini.

Uttanríkistænastan vísti á, at tað er neyðugt at seta krøv fyri at tryggja, at hvør einstaka verkætlan røkkur á mál, og er til gangs fyri tey, ið hon fevnir um. Tað er tó ynskiligt, at føroyskir felagsskapir kunnu gera seg galdandi í størri mun. Tí var avgjørt at skipa fyri einari verkstovu í nýggja árinum, har felagsskapir fáa ráðgeving og sparring í sambandi við ítøkiligar verkætlanir og umsóknir. Harumframt verður eitt dømi um eina góða og fullfíggjaða umsókn framleitt og løgd á heimasíðuna til íblástur.

# Um samstarvspartarnar

### Action Aid

Action Aid er ein altjóða felagsskapur við høvuðssæti í Johannesburg, Suðurafrika. Felagsskapurin, sum var stovnaður í 1972, hevur harumframt deildir í Asia, Suðuramerika og Evropa. Action Aid arbeiðir í 45 londum og hevur sum aðalmál at basa fátækdømi og órættvísi.
www.actionaid.org

### Christian Aid

Felagsskapurin Christian Aid varð stovnaður sum eitt kirkjuligt samtak aftaná 2. heimsbardaga fyri at hjálpa evropeiskum flóttafólkum, ið høvdu mist alt undir krígnum. Tað vóru bretskir og írskir kirkjuleiðarar, ið tóku stig til at stovna felagsskapin, sum byggir á kristnu trúnna, men sum virkar fyri øll uttan mun til átrúnað. Felagsskapurin virkar í dag í 50 ymiskum londum.
www.christianaid.org/uk

### Plan UK

Plan UK er deild í altjóða hjálparfelagsskapinum Plan, ið hjálpir fátøkum børnum úti í heimi. Felagsskapurin, ið hevur 70 ár á baki, leggur serligan dent á at tryggja børnum rættin til heilsu, harímillum atgongd til reint vatn, rættin til útbúgving og medávirkan.
Plan arbeiðir í 50 londum og hevur høvuðssæti í Onglandi. www.plan-uk.org/

### Voluntary Services Overseas (VSO)

VSO er ein altjóða felagsskapur, við meira enn 50 ára royndum á baki, ið arbeiðir við at basa fátækdømi í menningarlondum. Málið hjá VSO er at føra fólk saman og harvið deila og uppbyggja nýggja vitan, ið kann broyta lívsumstøðurnar hjá fólki til ta betra. Dentur hevur seinnu árini verðið lagdur á útbúgving, heilsu, harímillum HIV og AIDS, at hjálpa fólki at vinna sær til gerandisdagin (secure livelihoods) og rættindini hjá fólk, ið bera brek.

Felagsskapurin er skrásettur í Onglandi og hevur virksemi í meira enn 40 londum. www.vso.org.uk

# Fíggjarnýtsla 2013

## Menningarsamstarv

| Verkætlan | Land | Upphædd |
|---|---|---|
| VSO | Nepal | 702.000 kr. |
| Tommy Petersen v. Danida | Palestina | 72.000 kr. |
| Cristian Aid | Kenja | 373.610 kr. |
| Plan UK | Togo | 200.000 kr. |
| Action Aid | Etiopia | 259.000 kr. |
| Action Aid | Uganda | 393.350 kr. |
| **Tilsamans** | | **1.999.960 kr** |

## Neyðhjálp

| Verkætlan | Upphædd |
|---|---|
| WFP (Sýria) | 300.000 kr. |
| Reyði Krossur (Filipsoyggjarnar) | 200.000 kr. |
| **Tilsamans** | **500.000 kr.** |

**DAC List of ODA Recipients**
**Effective for reporting on 2012 and 2013 flows**

| Least Developed Countries | Other Low Income Countries (per capita GNI <= $1 005 in 2010) | Lower Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $1 006-$3 975 in 2010) | Upper Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $3 976-$12 275 in 2010) |
|---|---|---|---|
| Afghanistan | Kenya | Armenia | Albania |
| Angola | Korea, Dem. Rep. | Belize | Algeria |
| Bangladesh | Kyrgyz Rep. | Bolivia | *Anguilla |
| Benin | Tajikistan | Cameroon | Antigua and Barbuda |
| Bhutan | Zimbabwe | Cape Verde | Argentina |
| Burkina Faso | | Congo, Rep. | Azerbaijan |
| Burundi | | Côte d'Ivoire | Belarus |
| Cambodia | | Egypt | Bosnia and Herzegovina |
| Central African Rep. | | El Salvador | Botswana |
| Chad | | Fiji | Brazil |
| Comoros | | Georgia | Chile |
| Congo, Dem. Rep. | | Ghana | China |
| Djibouti | | Guatemala | Colombia |
| Equatorial Guinea | | Guyana | Cook Islands |
| Eritrea | | Honduras | Costa Rica |
| Ethiopia | | India | Cuba |
| Gambia | | Indonesia | Dominica |
| Guinea | | Iraq | Dominican Republic |
| Guinea-Bissau | | Kosovo[1] | Ecuador |
| Haiti | | Marshall Islands | Former Yugoslav Republic of Macedonia |
| Kiribati | | Micronesia, Federated States | Gabon |
| Laos | | Moldova | Grenada |
| Lesotho | | Mongolia | Iran |
| Liberia | | Morocco | Jamaica |
| Madagascar | | Nicaragua | Jordan |
| Malawi | | Nigeria | Kazakhstan |
| Mali | | Pakistan | Lebanon |
| Mauritania | | Papua New Guinea | Libya |
| Mozambique | | Paraguay | Malaysia |
| Myanmar | | Philippines | Maldives |
| Nepal | | Sri Lanka | Mauritius |
| Niger | | Swaziland | Mexico |
| Rwanda | | Syria | Montenegro |
| Samoa | | *Tokelau | *Montserrat |
| São Tomé and Príncipe | | Tonga | Namibia |
| Senegal | | Turkmenistan | Nauru |
| Sierra Leone | | Ukraine | Niue |
| Solomon Islands | | Uzbekistan | Palau |
| Somalia | | Vietnam | Panama |
| South Sudan | | West Bank and Gaza Strip | Peru |
| Sudan | | | Serbia |
| Tanzania | | | Seychelles |
| Timor-Leste | | | South Africa |
| Togo | | | *St. Helena |
| Tuvalu | | | St. Kitts-Nevis |
| Uganda | | | St. Lucia |
| Vanuatu | | | St. Vincent and Grenadines |
| Yemen | | | Suriname |
| Zambia | | | Thailand |
| | | | Tunisia |
| | | | Turkey |
| | | | Uruguay |
| | | | Venezuela |
| | | | *Wallis and Futuna |

*Territory.

(1) This is without prejudice to the status of Kosovo under international law.